# Hitapumpur: Fupp ella fakta

**Elmálarnir vera avlisnir í hesum døgum, men vónandi vera timburmenninir ikki ov ringir fyri tey sum nýta hitapumpu**

SJÓNARMIÐ

*Thorman Kruse*



Vit nærkast kaldastu tíðini á árinum. Og alheims upphitingin hevur fingið nógva rúmd í miðlunum.

Hitapumpur er svarið uppá, hvussu vit sleppa undan at brenna nakað, og soleiðis ikki vera við til at økja um koldioxid útlátið.

Tankin er helst góður, men hvussu roynist hann í veruleikanum?

Seljarin sigur, at hitapumpan er góð og virkar væl. Helst hevur hann rætt, tí ein hitapumpa er ein snild uppfinning við meir enn 80 ár á baki. Hvørt húsarhald hevur eisini minst eina, og oftast fleiri. Vit kenna tær best sum frystiboksir og køliskáp. Men - til ber at venda pumpuni og royna at frysta uttandura og soleiðis fáa hitan inn í húsini.

Hitapumpur vóru eisni á móta miðskeiðis í sjeytiárunum, men svunnu síðan sum døgg fyri sól. Nógv er lært síðani tá - og nú er grundin eisini ein onnur - kanska. Men er nakað at spara?

Tey lond vit samanlíkna okkum við hava ein heilt annan orkupolitik enn vit, við hægri oljuavgjøldum og lægri elprísi, so beinleiðis samanburur er ikki møguligur.

Sum útgangspunkt hava vit møguleika antin at brenna olju ella at nýta hitapumpu, sum verður drivin vil elorku. Hyggja vit eftir prísinum, so gjalda vit góðar 6 krónur fyri ein litur av olju. Hetta svarar til uml. 36MJoule. Skulu vit keypa ein tilsvarandi "orkupakka" kostar hesin um kr 14. Við øðrum orðum er tað 2,3 ferðirnar so kostnaðarmikið at hita við el sum olju.

Hetta, at el kostar meir enn olja er ikki løgið, tí at øll nýtlsa omanfyri helmingin av tí sum SEV

framleiðir, verður framleid við olju. Termisk elverk er eingin effektiv maskina. Um 40% av orkuna fer upp gjøgnum skorsteinin og eini 15% burtur við kølivatn til motorin. Við eini aksilorku uppá í mesta lagi 45% byrjar elframleiðslan. Henda hevur eisini tap, og helst kemur ikki meir enn 1/3 av orkuni út til brúkaran, sum kortini má gjalda fyri alla oljuna. Afturat hesum skal brúkarin gjalda fyri distributións-kervið.



Afturfyri fær brúkarin eisini eina dygdarvøru. Spenningurin er 400V og 50Hz 24/7 alt árið og tú brúkar uttan at hava keypt niðurfyri, reina orku mótvegis sekitna oljubrenn-aranum.

Um SEV nú skuldi goldið sama prís fyri oljuna sum tú, hevði øll meirframleiðsla (við olju) kostað

brúkaranum um kr.20 altso góðar tríggjarferðir so nógv sum olja til miðstøðuhitan, so siga vit at

hitapumpan hevur eitt heystanarstig, COP uppá 3, so er júst javnvág í roknskapinum báðum, bæði CO2 og krónunum. Valdi eg hitapumpu framum oljufýri, má eg gjalda henda meirkostnaðin eisini.

Samanumtikið lønar tað seg ikki at brúka hitapumpu, um hendan er drivin við elmegi!

Núverandi orkupolitikkur og oljuprísir eru ikki eggjandi til at royna aðrar hættir til hitan av húsum.

Tað loysir seg rætt og slætt ikki hvørki fíggjarliga ella samvitskuliga.

Hóast vit ikki brenna olju, so ger SEV tað fyri okkum. Men tað at vit eru varug við at vit nýta orku, kann gera at vit minnast til at taka styttri brúsubað og lata okkum í eina troyggju ístaðin fyri at skrúa upp fyri hitanum.

Høvdu vit elframleiðslu uttan olju var hitapumpan ein góð loysn, men tað er hon ikki um hon er drivin vi el sum er framleitt við olju. Hækkar oljuprísurin, gerst hitapumpan meiri áhugaverd, men so er vandi fyri at elprísurin eisini hækkar, og so er onki vunnið.

# Á dett Pisatos, skemt ella álvara í breiðum samanhangi

LINJOHN CHRISTIANSEN



Ein fragt fyri oyra at hoyra føroyingar kring knøttin senda heilsanir heim til jóla. Finst neyvan nakað land við lutfalsliga so nógvum fólki uttanfyri landoddarnar sum Føroyar. Stórur partur í leiðara størvum. Ljóðaði annars sambært Pisa kanningini og fjepparum til at vera heilt galið.

**Foreldur**

Skulu vit ikki eftirkanna okkum sjálvi sum foreldur í hesum føri. Hvønn førn-ing hava børnini fingið við sær í skúlan? Hvat tíð seta vit av til tey, tá tey koma heim aftur?

Vit, ið fingu børn báðu-megin pisa árgangirnar, eru ikki vaksin upp á mold-gólvi; eru heldur telduforeldrini. Saman við børnu-num kom teldan í heimini – børn og teldan vuksu upp saman.

Flestu foreldur koma altíð at seta sær spurningin "hava vit gjørt nokk fyri at hjálpa børnunum ávegis?". Heimaparturin av skúla-gongdini, lesing, rokning, skriving og almenna vitan skal eisini finnast í heimi-num. Viðvíkjandi teldu er tað í flestu førum eggið, ið lærir hønuna.

At vekta børn klók og minni klók er sera óheppið. Evnini skapt av umhvørvi-num eru ymisk, eins væl og føroyska samfelagið er ymiskt frá øðrum.

**Føroyska skúlaverkið**

Kom at tosa við mammu at hálvvaksnum børnum, ið farin var at lesa pædagogi, um hví hon var farin. Hetta var av tí einfaldu orsøk at verja um børnini, ið klára seg væl; tey fáa onga avbjóðing í skúlanum.

Hetta er júst vandamálið við at hava ein skúla fyri øll og onki meira. Ferðin verður og er dead slow. Ein skipan, ið ikki megnar at fáa tann minni áhugaða fram, men egnar seg væl at tálma tí egnaða og áhug-aða. Hetta var júst niður-støðan av Pisa kanningini. Tað er her broyting eigur til, so øll fáa eina avbjóð-ing, um tað so skal eita, við hjálp frá serlærara ella við at bólka flokkin.

Persónliga haldi eg, at tvungin skúlagongd til 9. flokk er skeiv. Umhvørvið hjá børninum er so ymiskt her hjá okkum. Tað eru børn, ið eru deydatroytt av skúla tá 7 ár eru farin. Tað er so nógv annað, ið dregur. Hesi børn høvdu fingið gott av at sloppið út. Bæði børn, foreldur og undirvísingin høvdu vunnið.

Hinvegin renna tey høvdið ímóti og síggja, at valið ikki var rætt, skuldi eitt eitt-ára skeið í einum 11. flokki tryggjað teimum atgongd til miðnámsskúla.

**Føroyska samfelagið**

Samfelagið er eisini dump-að. Klók foreldur fáa klók børn. Havi ikki hoyrt so galið. Av øllum foreldrum, ið fingu børn í 1989 og 1990 eru bert 3 klók, sam-bært Pisa. Nú er galið, er tað innavl ella er tað grindin, vit eta?.

Kongafamiljurnar í grannalondunum eta ikki grind. Hinvegin hava nógv giftarmál verið teirra mill-um, so kanska oyrini á onkrum eru í landnyrðing og útsynning. Tær hava loyst vandan við at loyva nýggjum blóði inn í familj-urnar. Vit kundu gjørt tað sama, og skunda undir eina alt ov seina útlendingalóg. Kanska tað kundi hjálpt uppá arbeiðsmegina og Pisa um nøkur ár.

**Ikki so galið kortini**

Samfelagið á gosi um pengar og pengar. Endur-útbúgvingar, hækkan av tímatali, bachelor útbúgv-ingar o.a.m. Alt er gott, men loysir ikki neyvan alt. Høvdu lærarar og næm-ingar vitað, hvønn rumbul kanningin fekk, hevdi úrslitið helst verið eitt annað. Men tað varpar hóast alt ljós á skúlaverkið.

Barnið hevur eitt reint og óspilt náttúruvit, um tað er føtt í Finnlandi ella Føroy-um. Ein góð heild frá heimi, stovni og skúla eigur at vera eitt gott støði, tá farast skal út í lívið.

Kundi verið áhugavert at vita niðurstøðuna hjá Pisa, itu tríggir av næmingunum: Einstein, Maradona og Jákup á Dul.

Annars fari eg at ynskja tykkum øllum eitt gott komandi Pisa ár. Ein serlig heilsan til tykkum lærarar og næmingar. Tað er ikki so galið kortini.

# Ja jeg havi hugsað meg um – Sirið!

SIGNAR DAM

Tvøroyri

Ja tað er í lagi at miðnáms-skúlin varð fluttur á eitt í allar mátar meira hóskiligt stað, so at vit fáa eina framtíðartryggjaða loysn á hægri útbúgvingini í Suðuroy og ikki enn eina fyribilsloysn.

Tað er meira enn 10 mill kr vert at hesin tjóðveldis-brølarin varð rættaður.

Nei tað var ikki í lagi, at Tjóðveldisflokkurin saman við Sambandsflokkinnum - við at framtvinga val í úrtíð-saboteraði ætlanina um økisdepil fyri sinnis-veik í suðri.

Men vit koma aftur!

Skattalættin til hægst-løntu var í lagi, tí hann var ein fyritreyt fyri at vinna meirluta fyri at samhald-fasti aftur kom at virka eftir Javnaðarfloksins ætlan, soleiðis at pension-istar nú fá 2000 kr um mánaðin, har teir undir Tjóðveldinum fingu 600 kr!

Ikki eina krónu meira úr samhaldsfasta fingu pen-sionistarnir meðan Tjóveldi sat 98 -04, og ongin ivi er um, at fær Tjóðveldi møguleikan, so avskaffa teir samhaldsfasta og brúka tær 500 mill kr sum eru í grunninum til at avskaffa blokkin við.

Annars er skattalættin tíðaravmarkaður, tað er samhaldsfasti ikki.

Nei tað var ikki í lagi, at Tjóðveldisflokkurin saman við Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum, Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum ein-skildu Føroya Banka.

Bankin skuldi ongantíð verið einskildur.

Handfaringin av uttan-ríkispolitisku heimildar-lógini var til eitt 13 tal!

Nei, fólkaskúla- og miðnámsskúlaviðurskiftini eru ikki í lagi – langt frá.

Men skjøtil er settur á við at byggingin í Hovi er byrjað. Skúladepilin í Marknagili er útboðin og fiskivinnuskúlin í Vest-manna er viðtikin. Í alt skúlabygging fyri fleiri hundrað milliónir!

Hugsar man seg um sum tú fyrislær, so sær ein jú vandan fyri stórum aftur-stigi á hesum øki um tjóðveldispolitikkur verður galdandi, tí um blokkurin verður avskaffaður við einum pennastroki so verður lítið eftir til m. a. skúlabygging.

Føroyska samfelagið hevur brúk fyri tryggleika og politiskum stabiliteti og tað hevur

Javnaðarflokkurin eina-ferð enn í hesari samgong-uni víst, at hann stendur fyri.

"Øðrvísi hugsandi" ja tað fingu vit roynt so tað fyrislær í tíðarskeiðinum 98 – 02!

Øll tey seinastu punktini í grein tínari eri eg púra samdur við tær um, men fortíðin hevur víst okkum, at tað er ógvuliga lítið sannlíkt, at nakað av hes-um verður gjøgnumført við Tjóðveldinum sum ein tíðandi faktor í føroyskum politikki!